




# Barnasjónleikur á ólavsøku



**Á ólavsøku verður skipað fyri barnasjónleiki niðri á Gamla Meiarínum. Sjónleikurin eitur Gátuføra Gívurin, og eru tað Súsanna Tórgarð, Birita Mohr og Gunnvá Zachariassen, sum eru tengdar at leikinum**

SJÓNLEIKUR
*Heini í Skorini*

Aftur í ár verður møguleiki hjá børnum at leita sær oman á Gamla Meiaríið á ólavsøku at hyggja at barnasjónleiki. Seinastu fimtan árini hevur altíð verið okkurt barnatiltak á skránni á hesum øki, og í ár er einki undantak. Onkuntíð hevur verið skipað fyri stórum sjónleikum, sum hava verið leiktir uttandura við Smiðjuna í Lítluvík, meðan tað fleiri ferðir eisini hevur verið spælt inni.

Í ár verður spælt inni, á Gamla Meiarínum, og eru tveir leikarar við í leikinum. Talan er um royndar og kendar leikarar, og tað eru tær báðar Birita Mohr og Gunnvá Zachariassen, sum spæla, meðan Súsanna Tórgarð hevur skrivað leikritið og leikstjórnað.

Leikurin er bygdur á eitt gamalt ævintýr, og haðani hevur Súsanna Tórgarð skrivað leikin. Tað er ikki eitt óvanligt ævintýr, talan er um, og flestu vanligu ævintýrafyribrigdi eru at síggja í leikinum.

Eins og til allar aðrar sjónleikir sigur Biritia Mohr, annar leikarin í leikinum, at nógv orka og tíð er løgd í sjónleikin, og at tey hava roynt at fingið leikin at vera so góðan sum gjørligt. Havandi í huga, at hetta eru royndir sjónleikarar, sum vita hvat teir gera, kunnu hyggjararnir uttan iva vænta sær eina góða sýning.

### Neyðugt við onkrum til børnini

Birita Mohr sigur, at tey gera hetta orsaka av børnunum, og at hetta er eitt neyðugt tiltak til børnini. Á ólavsøku eru ofta ov fá tiltøk, sum serliga eru ognað børnum, meðan tað kanska er í meira lagi til vaksin. Tískil síggja leikararnir hetta sum eitt neyðugt alternativ til yngra ættarliðið.

- Um einki er til børnini uttan ísar og ballónir, verður ólavsøkan ikki serliga áhugaverd fyri tey, og tískil gera vit hetta, sigur Birita Mohr.

Sýningarnar á ólavsøku vera ólavsøkuaftan klokkan 18 og ólavsøkudag klokkan 16 og 18. Síðani er ætlanin at hava nakrar sýningar beint eftir ólavsøkuna, so tað ikki bert vera hesar tríggjar sýningarnar á sjálvari ólavsøkuni. Barnasjónleikurin eitur Gátuføra Gívurin, og er fyrsta sýning sum sagt ólavsøkuaftan klokkan 18 á Gamla Meiarínum.

# Løgreglan lagt arbeiðsætlan til ólavsøkuna

**11-12 fólk vera til arbeiðis á løgreglustøðini um ólavsøkuna, og vaktirnar eru á 12 tímar. Arbeiðsætlan varð løgd seinast í juli, og fundir hava verið við Býráðið um trygdina. Petur Poulsen, varaleiðari á politistøðini, sigur, at teir eru væl fyrireikaðir**

ÓLAVSØKAN
*Heini í Skorini*

Løgreglan hevur fyrst í juni mánaði verið á fundi við Býráðið um øll serloyvi, søkt verður um á ólavsøku, og seinnni hava aftur verið fundir saman við m.a. Reyða Krossi, sløkkiliðnum og landssjúkrahúsinum á býráðnum um trygdartiltøk til midnáttarsangin.

Løgreglan hevur 11-12 fólk í arbeiði um ólavsøkuna, og vaktirnar eru á 12 tímar. Arbeiðsætlan er løgd seinast í juni mánaði, og Petur Poulsen, varaleiðari á Politistøðini, sigur, at teir eru væl fyrireikaðir, og at allir menn kenna sína uppgávu.

- Tað er altíð nógv at gera, og serliga gevur fulla fólkið løgregluni eitt sindur av trupulleikum. Tá kalt ella vátt er í veðrinum, er hættisligt at detta av, og nógv orka verður nýtt til henda trupulleika á ólavsøku, sigur Petur Poulsen.

Petur Poulsen sigur, at viðvíkjandi trupulleikanum av avdotnum fólki, er herbergið hjá Frelsunarherinum ein dyggur stuðul, og har verður tikið sær væl av fólki, sum koma illa fyri.

### Samstarv við aðrar trygdarbólkar

Annars sigur Petur, at teir heilt stóru bardaganir og og trupulleikarnir eru fáir av, hóast onkur altíð kemur upp at keglast.

- Tá ein hugsar um tað nógva fólkið, eru fáar av teimum heilt stóru vanlukkunum. Tað er allatíðina arbeiði á skránni hjá okkum, men vit vóna at sleppa undan at skula steðga heilt stórum balladum, sum kunnu vera til stóran skaða, sigur Petur.

Løgreglan hevur samstarva nógv við býráðið, Reyða Kross, landssjúkrahúsið og sløkkiliðið, og fara allir hesir trygdarfelagsskapir at samarbeiða um ólavsøkuna. Ambulansur vera eisini til reiðar í miðbýnum í Havn, og sostatt má sigast, at eitt vælskipað trygdarnet er í ár fyriskipað á ólavsøku.

Við arbeiðsætlanum, fundum við aðrar trygdarbólkar og nógvari manning er løgreglan til reiðar til ólavsøkuna 2001, og Petur Poulsen er bjartskygdur.

- Undanfarin ár hava fáar av stóru vanlukkunum verið, og tá vit í ár eru so væl fyrireikað á politistøðini, samstundis sum samarbeiðið við júst nevndu felagsskapir er gott, skal alt nokk ganga eftir ætlan, sigur Petur Poulsen, varaleiðari á Politistøðini, at enda.



*Løgreglan hevur samstarva við býráiðið, Reyða Kross, sløkkiliðið og landssjúkrahúsið, og eru fyrireikingarnar til ólavsøkuna góðar*


